Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Annika Olsen, løgtingskvinna

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í figgjarmálum

Evni: Rúsevnaeftirlit

Spurningar:

1. Hvør hevur eftirlit við donsku sjóverjuni hvat viðvíkur smugling?
2. Hvussu ofta hevur danska sjóverjan lagt at kai í Føroyum seinasta árið?
3. Hvussu ofta hevur eftirlit verið umborð?
4. Eru rúsevni nakrantíð funnin umborð á donskum sjóverjuskipum?

Viðmerkingar:
Rúsevni gerast alsamt meiri vanlig í býarlívinum, sum viðføra vandastøður fyri tann einstaka. Saman við mongdunum av rúsevnum í býarlívinum er úrslitið eisini ofta harðskapur, eisini av tí grovara slagnum. Samstundis hoyra vit dagliga í miðlunum um, at hald er lagt á so og so nógv gramm og kilo av hasji, amfetamini v.m. Fyri at vita, hvussu vit kunnu hava fullkomið eftirlit við landamørkunum bæði sjóvegis og loftvegis verða hesir spurningar settir.

Á Løgtingi, 4. november 2025

Annika Olsen